# Garanti

## VØRUR OG TÆNASTUR:

- HDYGD VINDEYGU ÚR PLASTI, TRÆ OG TRÆ/ALU.
- HDYGD ÚTHURÐAR OG SKJÓTIHURÐAR ÚR PLASTI.
- HDYGD ALTANHURÐAR ÚR TIMBRI.
- ÍSETAN AV NEVNDU VØRUM.

## VINDEYGU OG HURÐAR

### 12 ÁRA GARANTIIÐ UPPÁ HDYGD-VINDEYGU OG HDYGD-HURÐAR FRÁ GRANT FEVNIR UM HESAR MANGLAR ELLA FEILIR:

- Døgg millum rútarnar.
- Rotskaðar (*bert* um tú hevur liðug málað vindeygu frá GRANT).
- At viðurin í timburvindeygum skýtur seg og fer sundur í límingini.

### UM NEVNDU MANGLAR ELLA FEILIR ERU, TRYGGJAR GARANTIIÐ AT VIT:

- Útvega og seta nýggjan rút í, skuldi døgg verið komið millum rútarnar.
- Útvega og seta nýtt tilfar í, har rotskaði er hendur.
- Umvæla ella seta nýtt tilfar í, har timbur hevur skotið seg ella er farið sundur.
- Útvega nýggjar lutir, um so er, at teir ikki kunnu rættast.
- Har tað ikki ber til at bøta um mangul ella feil, kann einasta loysn onkuntíð verða, at vit skifta alt vindeyga.

## ÍSETAN

### 5 ÁRA GARANTI UPPÁ ÍSETAN FRÁ GRANT FEVNIR UM:

- Um vindeygu ella hurðar eru skeivt sett í, soleiðis at tað gýsur vindur ella lekur regn inn.
- Um vindeygu ella hurðar eru skeivt sett í, soleiðis at vindeygu og hurðar ikki kunnu latast upp og aftur sum ætlað.
- Garanti dekkar ikki vanliga aldring av fuku.

## FYRIVARNI

Garantiið er sjálvandi bert galdandi um vindeygu og hurðar hava verið brúkt og viðlíkahildin á vanligan skilvísan hátt, og ikki hava verið úti fyri óvanligum umstøðum, sum t.d. brot í illveðri ella óvanlig og ógvuslig nýtsla. Garantiið fevnir tí ikki um skaðar ella trupulleikar, sum beinleiðis standast av væntandi ella ongum viðlíkahaldi, t.d. smyrjing av liðiligum deilum.

## BOÐA FRÁ FEILI ELLA MANGLI

Fráboðan um trupulleikar má sendast okkum beinanvegin, tá mangulin/feilurin verður uppdagaður. Skjót umvæling kann byrgja fyri at skaðin ikki gerst størri enn neyðugt. Allar fráboðanir skulu vera skriftligar og sendast til okkara. Brúka frymil á heimasíðuni: www.grant.fo/feilfrabodan.

*Vit gera tað vit kunnu, fyri at allar vørur og tænastur frá GRANT eru lítaleysar. Nøgdir kundar er okkara fremsta mál. Tó, um okkurt ikki er sum væntað, so vilja vit sjálvandi við sama hugburði bøta um feilir ella manglar.*

Legg til merkis, at hesar treytir eru galdandi fyri tilboð og ordrar latin eftir dags dato. Gamla garanti-avtalan er galdandi fyri eldri ordrar.

Vinarliga heilsan
GRANT

*Dagført 3. juni 2021*

í Geilini 2 / 385 Vatnsoyrar / (+298) 35 50 00 / grant@grant.fo / www.grant.fo